**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrasystrar til E2/E3

Hesi føstu størv á E2/E3 eru leys at søkja til setan 1. mars 2002, ella eftir avtalu:

- sjúkrasystir á starvsbrøki 0,7 í dag- og náttarvakt
- sjúkrasystir á starvsbrøki 0,8 í blandaðum vaktum

Deildin er ein blandað medisinsk/geriatrisk deild við 19 seingjarplássum – 10 pláss til eldri búfólk og 9 medisinska pláss. Á medisinska økinum arbeiða vit við miðvísari uppvenjing av fólkum við heilaskaða.

Trivnaðurin hjá búfólki, sjúklingum og starvsfólki hevur høga raðfesting. Vit hava eitt opið og positivt arbeiðsumhvørvi og positiva menniskjaáskoðan.

**Okkum tørvar, at tú:**
- hevur hug til og evni at menna teg
- hevur góð samstarvsevni

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja tlf. 313540 Óluvá Hentze, deildarsjúkrasystir, á lokal 216, e-post: e3@ahs.fo ella til Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300, e-post: asap@ahs.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya/ og Sjúkrahjálparafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 18. februar 2002 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn


**Brandt Blomberg**
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
**Turkitrumla**
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan temperatur
prísur fyrr 5.395,-
**Nú 4.795,-**



pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

**Brandt Blomberg**
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
6 kg turr klæðir
600-1600 snúningar




prísur fyrr 6.295,-
**Nú 5.595,-**
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



**Brandt Blomberg**
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
* Glas keramikk plátur
* Yvir- og undirvarma
* Heita luft
prísur fyrr 7.995,-
**Nú 6.995,-**
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460




**Brandt Blomberg**
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
- 6 kg turr klæðir
- 600-1600 snúningar
- Tíðarstýring 1-24 tímar
- Orkuklassi A
- Vaskievni A
- Centrifugeringsevni A
prísur fyrr 9.995,-
**Nú 8.995,-**
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460


**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

## Uppstillingarfundur

2. og 3. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður mikukvøldið 6. februar kl. 19.30.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9.

**Nevndin**

## Timburmenn

Søkt verður eftir 2 timburmonnum at arbeiða fyrifallandi arbeiði hjá Runavíkar Kommunu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Teknisku Umsiting.

Umsókin skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 12. februar 2002.

Runavíkar Kommuna
**Runavíkar býráð**

## Javnaðaráhugað í norðaru helvt av Suðuroynni

Stovnandi aðalfundur av nýggjum javnaðarfelagi fyri Suðuroyar norðaru helvt verður á Hotel Tvøroyri sunnudagin 3. februar kl. 15.00.

**Fyrireikingarnevndin**


veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo


**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

## Skrivari

Starv sum skrivari á Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja til setan 1. mars 2002 ella skjótast gjørligt.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um skrivarauppgávur, heruppií at samskipa telefon- og brævasamskiftið, hjálpa til at samskipa millumtjóða tiltøk og røkja útbúnaðin í uttanlandsdeildini. Starvið fevnir eisini um at hjálpa til við øðrum uppgávum í Løgmansskrivstovuni.

**Yrkislig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Serligur dentur verður lagdur á góðan málkunnleika í føroyskum og enskum máli í skrift og talu.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera skilagóðir, miðvísir og arbeiða sjálvstøðugt og haftrat at vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er í fyrsta lagi uttanlandsdeildin á Løgmansskrivstovuni. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt í lønarflokki III sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra, tlf. 351010, teldupostur: hs@tinganes.fo

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda

Løgmansskrivstovuni
Tinganesi
FO-100 Tórshavn

Telefaks 351015
Teldupostur info@tinganes.fo

og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. februar 2002.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í triggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landsstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

# 14 ÍSLENDINGAR

Ársins fyrsta listaframsýning í Listaskálanum letur upp

*LEYGARDAGIN 2. FEBRUAR KL 16.00*

Hetta er sera fjølbroytt framsýning við 14 listafólkum av Akureyri:

*Anna Maria Guðmann — Akrylmálningar*
*Anna Sigfríður Hróðmarsdóttir — Leirlist, steintoy og postalín*
*Anne Kampp — Leirlist*
*Einar Helgason — Vatnlitamálningar*
*Guðmundur Ármann Sigurjónsson — Oljumálningur*
*Hadda — Akrýl og damask*
*Halldóra Helgadóttir — Oljumálningar*
*Hrefna Harðardóttir — Steintoy*
*Jonna — Akrýlmálningar*
*Ragnheiður Tórsdóttir — Vovnar myndir*
*Rósa Kristin Júliúsdóttir — Pappírsteppi*
*Sigríður Águstsdóttir — Keramikkur, leirlist*
*Sigurveig Sigurðardóttir — Akrýl- og oljumálningar*
*Sveinbjørg Hallgrímsdóttir — Grafikkur*

Hesi 14 listafólkini reka saman gallaríið *Samlagið* í tí tiltikna listaumhvørvinum "Listagilinum" á Akureyri

*****************************

*Býráðsformaðurin á Akureyri* — Kristján Ioór Júliusson — *setir framsýningina*

# LISTASAVN FØROYA

# Kappróðrarneystið á Glyvrum

verður tikið alment í nýtslu leygardagin
9. februar kl. 15.00

Kappróðrarfelagið vil takka hjartaliga fyri dyggan stuðul frá einstaklingum, virkjum og handlum, sum hava stuðla okkum í sambandi við byggjan av neysti og nýggjum bátum. Enn einaferð hjartaliga tøkk øll somul.



**Skrá fyri dagin:**

| | |
|---|---|
| kl. 10.00 | Aðalfundur hjá kappróðrarfelagnum við vanligari dagsskrá |
| kl. 15.00 | Almenn móttøka. Eystankórið og Mannskórið luttaka |
| kl. 16.30 | Uppboðsøla av 20 málningum og myndum sum polittikara og lokal fólk hava málað |
| kl. 20.30 | Veitsla í neystinum har øll eru hjartaliga vælkomin. Tekningarlistar liggja frammi í Statoil og Kiosk Vár. Undirhald við Hilmar Jan Hansen. Ragnar Nesstein spælir til dansin |

*Við kappróðrakvøðu*

**Kappróðrarfelagið N.S.Í.**

Nevndin


Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

FALLSKÍGGI
TIL SØLU



Ascending Parachutes
28 FT Jumbo
220m sleipi lína
Quick release
Trygdarbelti: XL, M & til børn
Egnaður til 2 pers.
Fa. Watersports
Tvøroyri • tlf. 215 210